*„Tey menniskju, sum hava upplivað holocaust inn at kroppin, og sum kunnu greiða frá hesum – eins og Hanna og Menakhem – eru í dag ikki so nógv í tali, og tey gerast alsamt færri.*

*„Eftir seks daga kríggið varð eingin ósigur kunngjørdur... í Egyptalandi og Sýria hátíðarhalda tey hesar dagarnar. Tað er slíkum umstøðum ein er noyddur at liva við í Miðeystri. Ein veit ongantíð hvat kann henda.*




*Menakhem við familju á barndómsgøtuni í Warzawa*




*Flóttafólkaskipið Exodus við 4.500 flóttafólkum umborð*




*Óli Jacobsen og Menakhem Ben-Yami. Teir hittust fyri fyrstu ferð á eini altjóða fiskivinnuráðstevnu yviri í statunum. Líka síðan hava teir hildið sambandið teirra millum við líka*

at práta um, tekur Hanna samanum.

## Holocaust

Tey bæði eru uppvaksin í Evropa. Menakhem í Warzawa, Póllandi, og Hanna í Berlin. Teirra lív og samstundis lagnan hjá fleiri av nærmastu familju teirra er neyvt bundin at søguni um jøðan, Ísrael og eisini at heimssøguni fyri 20. øld. Tað er serliga ræðuleikarnir í Týsklandi undir 2. veraldarbardaga, sum hava skorið seg sterkt inn í sinnini á teimum flestu. Og tey skara týðuliga framúr, tá ein hyggur afturá 20. øld. Tey menniskju, sum hava upplivað holocaust inn at kroppin, og sum kunnu greiða frá hesum – eins og Hanna og Menakhem – eru í dag ikki so nógv í tali, og tey gerast alsamt færri.

## Frá eini týningarlegu til aðra fangalegu

Menakhem sigur frá, at Ísrael var tað einasta staðið, har hann kundi kenna seg heima og sum sítt egna. – Eg kundi verið farin til Avstralia, eg hevði ein farbróður har. Men eg valdi Ísrael framum. Og eg havi ikki angrað. Familja mín hevur verið glað fyri at búgva í Ísrael. Eins og Menakhem, leitaðu fleiri onnur, ið yvirlivdu týningarlegurnar, sær vegin fram til Ísraels og festu røtur har.

– Eg fór av evropeiska meginlandinum úr Ítalia við einum skipi, ið kallaðist Muleddad Patria. Hetta var eitt sokallað immigrantskip, sum flutti ólógligar jøðiskar tilflytarar. Bretsku myndugleikarnir settu í hesumtíðarskeiðnum hámark fyri talinum av innflytarum til Ísraels. Sostatt gjørdust hesir tilflytararnir ólógligir og bretar forðaðu teimum eisini í at sleppa í land. Menakhem var nú limur í einum jøðiskum felagsskapi, sum skipaði fyri innflyting av jøðum til Ísraels. – Eg hevði gingið á sjómansskúla í 1946 í Fraklandi. Har varð eg útbúgvin telegrafistur og umborð skuldi eg taka mær av telegrafinum. Skipið sigldi úr Italia í mars 1946 og umborð vóru 1.600 flóttafólk.

– Men, tá ið vit nærkaðust landi út fyri havnabýin Haifa tóku bretskir hermenn ímóti okkum. Øll umborð vóru tikin og førd í annað skip og síðan send til Kypern. Hesi endaðu aftur í umstøðum, sum mintu um fangalegu – hesaferð í flóttafólkalegum.

Eg havi hoyrt hesa søguna fyrr. Men at sita yvirav einum, ið hevur upplivað hesar ræðuligu umstøðurnar, og hoyra hann siga frá hesi søguni, rørir ein av álvara, hóast eg í løtuni eri upptikin av at skrivi tað niður, sum hann sigur. Og ímeðan kølnar kaffið í koppinum.

Menakhem fortelur víðari: – Men eg og tveir aðrir av manninginí høvdu frammanundan funnið okkum eitt goymistað í kjølinum har frammi á skipinum. Bretar gassaðu skipið fyri at fáa øll tey, sum goymdu seg umborð, fram og í land. Har var ein øgiligur gangur og nógv rennarí á dekkinum. Tey vórðu øll send til Kyperns og vóru sett í fangalegu har. Men hjá okkum trimum gekk tað so akkurát. Har var sera trongt og ringt at standa, minnist Menakhem afturá. – Vit skiftust um at sleppa framat einum lítlum luftholi at anda. Holið var heilt uppi undir loftinum, so vit stóðu uppiá hvørjum øðrum. So, tá ið ein góð løta var fráliðin, og tað bleiv hvirt uppi á dekkinum, fór eg upp og svam eg í land. Men stutt eftir eg var komin upp á turt, bleiv eg fangaður av bretunum. Síðan sat eg í heilar fimm mánaðir í eini fangalegu.

Og so flýddi eg aftur. Á hesi fangaleguni vóru tað fleiri sum regluliga sluppu út, so mín rýming varð fyriskipað frammanundan. Hvønn fríggjadag kom ein lastbiliur við matvørum og serliga gjørdum breyði til sabbatina. Tá lastbilurin fór út úr aftur leguni vóru tvær tómar bingjur í aftan í bilinum og tómar erskjur lagdar omaná. Eg bleiv koyrdur í tað niðastu bingjuna og so hinar omaná. Eg var noyddur at bíða so leingi, tí bretarnir hildu eyga við mær. Eg royndi jú at sleppa undan teimum frá byrjan av.

## Samrøðan endar fyri hesuferð

Ein steðgur kemur í prátið og tað gongur eitt sindur seint hjá mær við at grifla øll notatini niður. Nú er tað at næsti spurningur skal setast.

– Hví spyr tú ikki um fótbólt!? Spyr Menakhem við einum smíli, eitt sindur brádliga og speiskliga. Hann hevur nógv uppá hjarta og hóast hesar upplivingarnar er hetta ein eldri harri við løttum sinni, sum eg siti yvirav.

– Ísrael mundi tapt ímóti Føroyum, tá ið teir spældu. Tað var rættiliga ótrúligt, tí okkara leikarar spæla dagliga í bestu deildunum í Evropa. Eftir dystin fekk eg úr at gera at greiða ísraelum frá, hvar hesar Føroyar lógu. Í fótbólti hava Ísrael og Føroyar so avgjørt nógv í felag. Vit eru jú í sama húsi, tá tað kemur til fótbóltin, sigur Menakhem smílandi og sipar til evropeisku fótbóltskappingina fyri tjóðir og eisini feløg.

Menakhem fær eisini lagt afturat sína meining um føroyskan fiskivinnupolitikk. Hann metir tað vera ein fyrimyndarligan politikk, ið nú verður rikin. – Ein fyrimynd fyri hinar evropeisku fiskivinnutjóðirnar. Hin fiskivinnupolitikkurin við kvotaskipanini er grundaðar á rangar niðurstøður frá byrjan av – tað sum tykist at vera, men í veruleikanum, ikki er.

Hetta er annars fyrstu ferð Hanna er í Føroyum og hon er bergtikin av náttúruni. Tey bæði hava verið leingi á ferð. Tað er ein og ein hálvur mánaður liðin síðan tey fóru úr Ísrael. Um fáar dagar eru tey aftur í heimbygd teirra, Kiyat Tiv´on. Seinni í heyst halda tey gullbrúdleypsdag. Tey vórðu gift í 1956 í einum størri ísraelskum býi – á trapputrinunum til eina synagogu, fortelur Menakhem.

Eitt hugtakandi prát er komið at enda. Men hóskvøldið verður høvið at hitta tey, seta teimum spurningar og hoyra tey siga frá heningaríka lívið teirra og núverandi spenntu støðuni í Ísrael. Tað er Ísraelsvinir, ið skipa fyri kvøldinum, ið byrjar kl. 19.00.